# RAKSTRAR- FÍGGJAR- OG ÍLØGUÆTLAN FYRI 2012

**Rakstrar- fíggjar- og íløguætlanin fyri 2012 tekur støði í rakstrar- fíggar- og íløguætlanini útsend 5. desember 2011 og Ískoytið útsent 18. desember 2011. Tekstur og tøl eru dagførd samsvarandi tí, sum er viðtikið á eykaaðalfundi tann 19. desember 2011.**

## 1. Inngangur

Fyrsta uppskot til rakstrar- fíggjar- og íløguætlan fyri 2012 er send eigarunum 5. desember 2011. Henda ætlan bygdi uppá eina príshækkan uppá 0,25 kr. pr. kWt. Felagið fekk svar uppá umsókn sína uppá príshækkanina frá Elveitingareftirlitinum tann 15. desember 2011. Við støði í innsenda tilfarinum og tí samskifti, sum hevur verið millum Elveitingareftirlitið og SEV viðvíkjandi elprísum, og vísandi til loyvistreytirnar í netloyvinum hjá felagnum kann Elveitingareftirlitið loyva eini príshækkan á 0,15 kr. pr. kWt uttan MVG galdandi frá 1. januar 2012.

Eftir hetta viðgjørdi nevndin hjá felagnum fíggjarætlanina fyri 2012 av nýggjum og skeyt tí upp at hækka prísin við 0,15 kr. pr. kWt. Hereftir bleiv eitt ískoytið til útsendu rakstrar- fíggjar og íløguætlan fyri 2012 gjørt og sent eigarunum tann 18. desember 2011. Ískoytið inniheldur virkningin av príshækkanini uppá 0,15 kr. pr. kWt.

Eigararnir samtyktu á eykaaðalfundinum tann 19. desember 2011 eina príshækking uppá 0,10 kr. pr. kWt at galda frá 1. januar 2012.

Niðanfyri er greitt frá fortreytum og viðurskiftum, sum dentur er lagdur á í sambandi við áseting av teimum einstøku inntøku- og útreiðslubólkunum í fíggjarætlanini fyri 2012 við støði í príshækkingini uppá 0,10 kr. pr. kWt.

Í ávísan mun er fyribilsætlanin fyri 2013 eisini inndrigin í ætlanina fyri 2012 fyri betur at kunna lýsa eina væntaða langtíðargongd. Metingarnar byggja millum annað á lagdar ætlanir framyvir og á roknskapar – og framleiðslutøl fyrstu 9 mánaðirnar av 2011.

Herumframt er skitsan fyri uppskot til langtíðarætlanina fyri útbyggingar innan varandi orkukeldur og termiskar orkukeldur innroknað í fíggjarætlanina fyri 2012 og frameftir. Í hesi skitsu, sum gongur frá 2011 til 2022, er fyri 2012 innroknað útbyggingin á Eiði og nýggju vindmyllurnar, sum ætlanin er at seta upp í Neshaga.

Skitsuuppskotið fyri langtíðarætlan leggur upp til ein vøkstur í framleiðsluni av elorku uppá 1% tey komandi 12 árini, tó so at fyri 2012 og 2013 er eingin vøkstur í nýtsluni, tí orkusparingin sum roknað verður við, at sparitiltakið hjá SEV fer at hava við sær, verður á sama støði sum vøksturin. Harvið er ikki roknað við vøkstri í elnýtsluni 2012 og 2013. Frá og við 2014 verður roknað við, at elektrifiseringin fer at økjast, og hevur hetta við sær ein samlaðan árligan vøkstur upp á 1% í elnýtsluni og harvið eisini í elframleiðsluni.

Fyri at tálma oljuútreiðslunum til elframleiðsluna, umframt at taka eitt stórt stig at økja um framleiðslupartin frá varandi keldum, kom SEV fyrst í november 2011 við einum uppskoti um at seta eina vindmyllulund upp í Suðurstreymoy.

SEV metir støðuna, við methøgum oljuprísum, at vera ræettiliga álvarsama, og ynskir felagið skjótast gjørligt at seta tiltøk í verk, sum minka um oljuútreiðslurnar. Uppskotið er ein verkætlan, sí notat dagfest 7. november 2011, ið kann verða skjót at seta í verk og sum einstaki brúkarin, og harvið eisini alt samfelagið fær ágóða av. Bæði hvat elprísum og umhvørvinum viðvíkur.

Í samskiftinum við Jarðfeingi um umrøddu vindmyllulund í rakstrarætlanini hevur Jarðfeingi sagt frá, at undirtøka er ikki fyri at fremja ætlanina á tann hátt, sum SEV leggur upp til. Verkætlanin skal

bjóðast út í fríðari kapping. Roknast skal tí við, at 2012 gongur við útbjóðing og projektering av verkætlanini í mun til at SEV kundi fara undir at fremja sjálva ætlanina í 2012.

At umsóknin um príshækkanina uppá tær 0,25 kr. pr. kWt ikki varð gingin á møti og at vindmyllulundin skal bjóðast út í fríðari kapping, í staðin fyri at byggja út eftir leistinum sum SEV skeyt upp, viðførir broyttar fortreytir í løgdu rakstraræltanini, sum felagið má taka avleiðingar av.

Vindmyllulundin verður nú innroknað í 2013 og ein møgulig framleiðsla av elorku herfrá er sett til medio 2014.

Við verkætlanini kann oljuinnflutningurin hjá SEV minka við nærum einum triðingi svarandi til 10.000 tons, og fer tað í síðsta enda at endurspeglast í einum bíligari elprísi ella tálmandi prís-hækkingum mótvegis kundunum og eini munandi minking í $CO_2$ útlátinum uppá umleið 33.000 tons árliga.

Rakstrar-, fíggjar og íløguætlanin fyri 2012 er í stóran mun merkt av ongum vøkstri í elsøluni, framvegis høgum kostnaði fyri olju til framleiðslu av elorku, stórum kostnaði av viðlíkahaldsarbeiðum og hækkandi rentuútreiðslum.

Felagið hevði eitt hall uppá 57,8 mió.kr í 2010 og framroknaða hallið í 2011 verður mett til 40 mió.kr. Tá er ikki íroknað kostnaðurin av kanningararbeiðinum viðvíkjandi Víkarvatn uppá umleið 5 mió.kr. Um hesin postur verður útreiðsluførdur í 2011, verður talan um eitt hall uppá 45 mió.kr. fyri 2011.

Felagið hækkaði elprísin 1. januar 2011 við 0,15 kr. pr. kWt við góðkenning frá Elveitingareftirlitinum. Samstundis ásannaði Elveitingareftirlitið, saman við SEV, at við høga oljuprísinum og við atliti at tørvinum um at útbyggja og endurnýggja bæði á linjuøkinum og í framleiðsluni verður neyðugt við príshækkingum eisini í 2012 og í 2013.

Í rakstraræltanini er roknað við eini hækking í elprísinum í 2012 uppá 0,10 kr. pr. kWt, og 0,15 kr. pr. kWt í 2013. Tað er ikki roknað við príshækkan í 2014.

Henda príshækking viðførir eitt hall uppá 16,2 mió.kr. mótvegis uppskotinum hjá nevndini, sum vísti eitt hall uppá 3,7 mió.kr. Nevndin skeyt tí upp at gera umleggingar og sparingar í rakstrinum fyri 5 mió.kr. soleiðis, at væntaða úrslitið fyri 2012 gerst eitt yvirskot uppá 1,3 mió.kr. Aðalfundurin vildi hava at felagið fremur umleggingar og sparingar uppá 5 mió.kr. meiri enn uppskotið hjá nevndini soleiðis, at samlaðu umleggingarnar og sparingarnar eru 10 mió.kr. fyri 2012. Hetta viðførir, at hallið uppá tær 16,2 mió.kr. minkar niður í 6,2 mió.kr. fyri 2012. Felagið fer undir at fremja umleggingar og sparingar í rakstrinum sum skjótast fyri at røkka málinum.

Fyri at felagið skal kunna verða ført fyri at halda eitt nøktandi gjaldføri, eins og at útvega fígging frá lánveitarum til tær stóru íløgurnar sum standa fyri framman, er neyðugt, at felagið fær javnvág í raksturin og at felagið hevur eitt nøktandi rakstrarúrslit sum skjótast.

Oljuútreiðslurnar eru 37,9% av samlaðu útreiðslunum íroknað avskrivingar. Tí hevur prísgongdin á olju stóran týdning fyri rakstrarúrslitið fyri 2012 og frameftir.

Trupult er at meta um gongdina í oljuprísinum, og tí er í rakstraræltanini "forward kurvan" pr. 24. oktober 2011 fyri oljuprísin komandi 19 mánaðirnar brúkt sum grundarlag fyri prísásetingini av oljuútreiðslunum fyri 2012 og fram.

Noteringin fyri oljuprísin pr. 24. oktober 2011 var 648 dolar pr. tons tungolju, meðan noteringin fyri oljuprísin pr. 25. november nú er 629 dollar pr. tons tungolju. Talan er um eitt prísfall uppá 19 dollar pr. tons tungolju. Oljuprísurin væntast at falla fram til juni 2013 til 596 dollar pr. tons tungolju, svarandi til 52 dollar pr. tons tungolju í mun til noteringina í oktober 2011. Oljuútreiðslurnar fyri 2012 væntast at verða áleið tær somu sum fyri 2011.

Hinvegin væntast oljuútreiðslurnar at lækka munandi í 2013 og fram, grundað á, at vatnorku-útbyggingin á Eiði verður liðug og harvið kann fara undir framleiðslu av elorku, eins og at nýggju vindmyllurnar í Neshaga framleiða elorku burturúr vindmegi.

Ætlaða vindmyllulundin í Suðurstreymoy fer væntandi undir framleiðslu av elorku burturúr vindmegi medio 2014. Lækkingin í oljuútreiðslunum í 2013 í mun til 2012 verður mett til 23 mió.kr. svarandi til 17,1%. Henda lækking í oljuútreiðslunum stavar frá øktari framleiðslu av el frá vatnorkuverkinum á Eiði og teimum trimum myllunum, sum felagið setur upp í Neshaga í 2012. Fallandi oljuútreiðslur grundað á vindmyllulundina síggjast fyrst í 2014. Tá verða oljuútreiðslunar mettar til at verða 92 mió.kr. soleiðis, at hesar falla við 42 mió.kr í mun til 2012, ella 31,2%. Hetta um fyritreytirnar fyri vindmyllulundina halda, sum roknað er við.

Rentustøðið á teimum lánum, sum felagið má taka í sambandi við framtíðar útbyggingar, fer eisini at hava ávirkan á príssetingina av elprísinum. Felagið vil arbeiða fyri at fáa eina so góða og lagaliga fígging sum til ber.

Hvørt felagið er ført fyri at halda fíggjarkostnaðinum á einum so lágum støði sum gjørligt, er treytað av rakstrarúrslitinum hjá felagnum framyvir.

## 2. Árið 2011

Staðfestu tølini fyri januar til september 2011 vísa eitt hall uppá 21,4 mió.kr., meðan árið væntast at geva eitt samlað hall uppá 40 mió.kr. Upprunaætlanin metti, at hallið fór at verða 32,9 mió.kr., svarandi til at hallið væntandi gerst 7,1 mió.kr. størri enn upprunaliga mett.

Høvuðsorsøkin til frávikið í úrslitinum í mun til upprunaætlanina er hækkandi oljuprísurin, har roknað varð við eini oljunýtslu uppá 117,3 mió.kr. móti framroknaða oljukostnaðinum uppá 135,3 mió.kr. ella ein munur uppá 18 mió.kr. Hinvegin hevur felagið lækkandi útreiðslur á øðrum økjum í mun til ætlanina. Teir skaðar, sum ódnarveðrið í november og desember 2011 førdi við sær, kemur helst at ávirka raksturin hjá felagnum nakað, sjálvt um felagið er væl tryggjað.

Inntøkurnar væntast at verða áleið tær somu sum upprunamett 314,5 mió.kr. í mun til framskrivað 315,9 mió.kr. ella ein minni inntøka uppá 1,4 mió.kr.

Útreiðslurnar til framleiðsluvirkini verða mettar til at verða sum ásett í upprunaætlanini svarandi til 72,5 mió.kr., meðan útreiðslurnar til netvirksemið hækka eitt vet við 1,4 mió.kr. Hinvegin lækka væntandi útreiðslurnar til fyrisiting við 9,7 mió.kr. í mun til upprunaætlanina, svarandi til ein fyrisitingarkostnað uppá 23,3 mió.kr.

Rentuútreiðslurnar netto vórðu upprunaliga mettar til 15,6 mió.kr., meðan framskrivað fyri 2011 verður mett 13,8 mió.kr., ein lægri útreiðsla uppá 1,8 mió.kr.

## 3. Inntøkur

Niðanfyri verður greitt frá, hvørji viðurskifti inntøkumetingarnar fyri ætlanina fyri 2012 byggja á.

### 3.1 Áseting av elprísinum

Felagið roknaði sambært rakstrar- fíggar- og íløguætlan fyri 2011 í november 2010 við einum halli uppá 32,9 mió.kr.

Við støði í staðfestum tølum fyri januar til september 2011 og mettum tølum fyri 4. ársfjórðing 2011 verður væntaða hallið 40 mió.kr. svarandi til, at hallið gjørdist 7,1 mió.kr. størri enn upprunað mett.

Í 2010 varð eisini roknað við, at hallið hjá felagnum fyri 2012 fór at gerast 9,5 mió.kr. Nú verður ætlað við einum halli uppá 6,2 mió.kr. ella 3,3 mió.kr. betur enn upprunaætlað í 2010. Eisini varð í 2010 ætlað eitt yvirskot í 2013 uppá 22 mió.kr., meðan ætlaða yvirskotið í 2013 nú verður mett til 6 mió.kr. ella 16 mió.kr verri enn upprunamett í 2010.

Felagið hevur havt sera stórar útreiðslur í sambandi við keyp av olju, og í upprunaætlanini fyri 2011 varð roknað við eini oljuútreiðslu pr. tons tungolju svarandi til 3.124 kr. Síðani 2010 er kostnaðurin av oljuni øktur munandi, og í ætlanini fyri 2012 verður roknað við einum oljuprísi pr. tons tungolju svarandi til 3.737 kr. svarandi til ein meirkostnað pr. tons tungolju uppá 613 kr. Tá ið felagið vanliga nýtir eitt stað millum 36 til 40 túsund tons tungolju árliga, er meirkostnaðurin av hesum, um roknað verður við 36 túsund tons tungolju 22,1 mió.kr. og við 40 túsund tons 24,5 mió.kr.

Um roknað verður við, umframt hækkingini í elprísinum uppá 0,15kr. pr. kWt í 2011, eini hækking í elprísinum uppá 0,10 kr. pr. kWt í 2012 og aftur við 0,15 kr. pr. kWt í 2013, hevði samlaði munurin mótvegis upprunaætlanini fyri 2011, 2012 og 2013 verið eitt samlað hall uppá 34,7 mió.kr.

Hetta hall svarar til 0,13 kr. pr. kWt í mun til 2011 framleiðsluna, sum felagið hevur fingið ov lítið í inntøku í mun til tær ætlaðu hækkingarnar uppá tríggjar ferðir 0,15 kr. kWt , sum upprunaliga ætlað í 2010.

Hækkingin í elprísinum uppá 0,10 kr. pr. kWt í 2012 viðførir, at gjaldsskráin pr. 1. januar 2012 og fram verður sum niðanfyri standandi talva vísir.

| Árlig nýtsla í kWt | Fast gjald um árið í kr. | Verandi prísur í kr. uttan og við MVG | Prísur fyri hvønn kWt eftir príshækking pr. 1. januar 2012 við 0,10 kr. pr. kWt uttan og við MVG |
|---|---|---|---|
| 0-10.000 | 480 | 1,36/1,70 | 1,46/1,83 |
| 10.000-100000 | 1.280 | 1,28/1,60 | 1,38/1,73 |
| >100.000 | 5.280 | 1,24/1,55 | 1,34/1,68 |

Serstøk gjaldsskrá er galdandi fyri ídnaðarvirkir, fiskaaling, landbúnað, fiskivinnu og ávísar edv-tænastur. Henda er sum niðanfyri standandi víst.

| Árlig nýtsla í kWt | Fast gjald um árið | Verandi prísur í kr. uttan MVG | Prísur fyri hvønn kWt eftir príshækking pr. 1. Januar 2012 við 0,10 kr. pr. kWt uttan MVG |
|---|---|---|---|
| 0-10.000 | 480 | 1,36 | 1,46 |
| 10.000-20000 | 1.280 | 1,28 | 1,38 |
| > 20.000 | 9.080 | 0,89 | 0,99 |

Við eini hækking uppá 0,10 kr. pr. kWt svarar hetta til, at ein privatkundi við eini miðalnýtslu uppá 4.000 kWt skal rinda 42 kr. meiri um mánaðin íroknað MVG.

Um talan er um ein privatkunda við eini miðalnýtslu uppá 6.000 kWt skal hesin kundin rinda 63 kr. meiri um mánaðin íroknað MVG. Hinvegin eru tað nógvir kundar, sum hava eina nýtslu, sum er lægri enn 4.000 kWt um árið, og harvið koma at fáa eina minni hækking enn tær 42 kr. um mánaðin.

Er talan um ein miðal vinnukunda, sum brúkar 12.000 kWt um árið, skal hesin rinda 100 kr. meiri um mánaðin.

### 3.2 Elnýtslan

Vøksturin í elnýtsluni hevur verið, sum niðanfyri standandi talva vísir.

| Ár | Avroknað elnýtsla til kundar í kWt í mió. | Vøkstur í kWt í mió. | Vøkstur í prosent |
|---|---|---|---|
| 2007 | 256,8 | 15,2 | +6,3 |
| 2008 | 258,9 | 2,1 | +0,8 |
| 2009 | 252,0 | -6,9 | -2,7 |
| 2010 | 255,0 | 3,0 | 1,2 |
| 2011 framroknað fyri árið | 250,0 | -5,0 | -2,0 |
| 2012 meting fyri árið | 250,0 | 0 | 0,0 |

Omanfyri standandi talva vísir, at roknað verður við einum falli í elnýtsluni uppá 2% í 2011 í mun til 2010.

Elnýtslan fyri 2012 væntast at verða á sama støði sum fyri 2011.

Roknað verður við eini øking í nýtsluni orsakað av, at kundar felagsins taka í nýtslu alt fleiri tól, sum brúka el, eitt nú hitapumpur og fleiri flatskermar og teldur pr. brúkara. Hetta er eisini nakað, sum nýggja heildarætlanin á elorkuøkinum í Føroyum umrøður.

Hinvegin fer ætlaða spariátakið hjá SEV at eggja kundunum til at spara elnýtslu í 2012, har tað kann lata seg gera.

Samanumtikið viðførur hetta, at SEV metir samlaðu elnýtsluna fyri 2012 at standa í stað, sjálvt um fleiri eltól verða tikin í nýtslu av kundunum hjá SEV, tí spariátakið fer at eggja teimum til at spara elnýtslu á fleiri økjum.

### 3.3 Samlaðar inntøkur

Á inntøkusíðuni verður støði tikið í miðalprísinum fyri 2010 innroknað príshækkingini fyri 2011, ella einum miðalprísi uppá 1,18 pr. kWt. Roknað verður ikki við eini týðandi broyting í samansetingini av elnýtsluni millum brúkararnar fyri 2012, enn tann, ið er galdandi í dag. Miðalprísurin fyri 2011 er fyri 2012 hækkaður við príshækkingini uppá 0,10 kr. pr. kWt, soleiðis at miðalprísurin, sum roknaður er við fyri 2012, er 1,28 kr. pr. kWt.

Við útgangsstøði í einum miðalprísi uppá 1,28 kr. pr. kWt og eini samlaðari avroknaðari sølu uppá 250,2 GWt verður samlaða inntøkan av sølu av kWt 319,5 mió.kr. Herumframt koma so inntøkur av fasta gjaldinum, íbindingargjaldinum og annað uppá 18,7 mió.kr, soleiðis at roknað verður við eini samlaðari inntøku uppá 338,2 mió.kr. Hetta svarar til, at felagið fær eina meirinntøku uppá 22 mió.kr. í mun til staðfest og ætlað í 2011. Orsøkin er hækkandi elprísurin.

## 4. Oljuútreiðslur

Oljuútreiðslurnar til egna nýtslu fyri 2012 eru mettar til at verða 134,5 mió.kr. Framroknaðar oljuútreiðslur fyri 2011 eru 135,3 mió.kr., sum er eitt vet lægri enn mett fyri 2012.

Fyri 2012 er roknað við einum prísi uppá 3.737 kr. pr. tons tungolju og einum samlaðum tonsatali uppá 36 túsund tons. Oljunýtslan í tonsum er mett at falla í 2013 við 5,2 túsund tonsum til 30,8 túsund tons . Fyri at áseta prísstøðið av oljukeypinum í rakstarætlanini fyri 2012 og 2013, er, sum áður nevnt, støðið tikið í "forward kurvini fyri oljuprísin av tungolju" pr. 24. oktober 2011 fyri komandi 19 mánaðirnar. Herumframt er dollarkursurin ásettur til 5,5 krónur pr. dollar.

Oljuútreiðslurnar svara til 37,9% av metta kostnaðinum og avskrivingunum fyri 2012 áðrenn umleggingar og sparingar uppá 10 mió.kr. Tí fær tað stóra ávirkan á rakstrarúrslitið, um gongdin í oljuprísinum og í kursinum á dollaranum verður munandi annarleiðis enn tað, ið mett er í rakstrarætlanini.

Herumframt keypir felagið eisini olju inn til víðari sølu til triðjamann. Hetta talið er fyri 2012 mett at verða 26,9 mió.kr. Felagið hevur eina inntøku svarandi til 0,6 mió.kr. av hesi víðari sølu.

At roknað verður við einum so høgum kostnaði av olju stendst av, at oljuprísurin er á einum høgum støði . Oljuprísirnir eru broyttir nógv seinastu árini, bæði upp og niður, tó mest uppeftir.

Niðanfyri standandi talva vísir gongdina í oljuprísinum seinastu nógvu árini. Talvan vísir kostnaðin í US-dollar pr. tons tungolju.




Omanfyri standandi grafur vísir, at oljuprísurin hækkaði í 2008 til tað hægsta nakrantíð. Síðani fall oljuprísurin aftur fram til ársskiftið 2008 fyri síðani aftur at vaksa, stórt sæð fram til dagin í dag. Oljuprísurin í dag er á einum høgum støði og umleið á hædd við tann høga prísin í 2008.

Sum nevnt frammanfyri er ikki roknað við vøkstri í elnýtsluni frá 2011 til 2012. Hetta viðførir, at elframleiðslan heldur ikki verður mett at vaksa. Roknað er við eini framleiðslu uppá 274,9 GWt fyri 2012 og 2013. Hetta er sama støði sum fyri 2011. Framleiðslan frá varandi orkukeldum er mett at verða 104,5 GWt. Henda stavar frá vatn- og vindorkuframleiðslu, har vatnorkan er nógv tann størsti parturin. Termiska framleiðslan er fyri 2012 roknað at verða 170,4 GWt.

Framleiðslan frá teimum varandi orkukeldunum er mett at vaksa í 2013 til 124,7 GWt, samstundis sum framleiðslan við termiskari orku er mett at falla til 150,2 GWt, svarandi til 20,2 GWt ella 19,3%. Hetta ger eisini, sum nevnt frammanfyri, at oljunýtslan fellur við 5,2 túsund tonsum.

Orsøkin er, at felagið tekur í nýtslu tríggjar nýggjar vindmyllur í Neshaga eins og Eiði 2 suður verður liðugt útbygt og kann fara undir at framleiða. Vindmyllulundin er ætlað at fara undir framleiðslu í 2014 og hetta viðførir, at framleiðsluparturin frá varandi orkukeldum vil vaksa til 158,2 GWt og tann termiska vil falla til 122,2 GWt í 2014.

## 5. Orkukeyp og vindorkuframleiðsla

Roknað verður við, at felagið sambært avtalu við Sp/f Røkt í Vestmanna fer at keypa vindorku-framleidda elmegi uppá umleið 7,3 mió kWt fyri 0,40 kr. pr. kWt. Hetta gevur eina útreiðslu til orkukeyp uppá 2,9 mió.kr., sum er innroknað í fíggarætlanina fyri 2012. Mett er við somu tølum fyri 2013. Hædd er tikin fyri hesum orkukeypi í framleiðsluni á Sundsverkinum og harvið sparing í oljuútreiðslunum. Eisini er hædd tikin fyri vindorkuni, sum felagið framleiður við sínum egnu myllum í Neshaga, svarandi til umleið 8 mió. kWt.

## 6. Útreiðslur

Rakstrarútreiðslurnar hjá felagnum verða vanliga býttar í lønir til starvsfólk og tilfar- og tænastu-veitingar. Hesir báðir bólkar verða aftur býttir millum netvirksemið, framleiðsluvirksemið og fyrisiting. Fyrisitingarútreiðslurnar hoyra sum útgangsstøðið til netvirksemið, men talan er í ávísan mun um felags útreiðslur, har ein partur eisini hoyrir til framleiðsluvirksemið.

### 6.1 Lønarútreiðslur

Roknað verður við eini samlaðari lønarútreiðslu uppá 65,6 mió.kr. í 2012 mótvegis framroknað 64,2 mió.kr. í 2011 svarandi til eina hækking uppá 1,4 mió.kr. ella 2,2%. Hetta er áðrenn umleggingar og sparingar eru innroknaðar í útreiðslubólkunum v.m., sum skulu gerast uppá íalt 10 mió.kr. fyri 2012.

Roknað er við einum minni lønarvøkstri í 2012 og áleið sama starvsfólkatali sum undanfarna ár, tó so, at ein ávís útskifting er í starvsfólkahópinum hjá felagnum, har fólk fara frá fyri aldur, og víðkan er innan ávís øki fyri at røkja neyðugar uppgávur.

### 6.2 Tilfar- og tænastuveitingar

Roknað er við einum samlaðum kostnaði uppá 60,8 mió.kr. í 2012 mótvegis framroknað 77,6 kr. í 2011 svarandi til eina lækking uppá 16,8 mió.kr. ella 21,7%. Hetta er áðrenn umleggingar og sparingar eru innroknaðar í útreiðslubólkunum v.m., sum skulu gerast uppá íalt 10 mió.kr. fyri 2012.

Í ætlanini fyri 2011 var roknað við eykaútreiðslum svarandi til 16 til 17 mió.kr. í sambandi við serstakar umvælingar á Heygaverkinum og hald annars á Fossáverkinum , serliga grundað á generatorhavarí á "Fossá 1", sum kom á heysti 2010, og sum er umvælt í 2011 við einum kostnaði uppá umleið 3,5 mió.kr. Fyri 2012 og 2013 er eisini neyðugt at rokna við eykaútreiðslum millum annað í sambandi við útbyggingina av Eiðisverkinum og fyri Sundsverkið.

### 6.2.1 Framleiðsluvirksemið

Útreiðslur til tilfar og tænastuveitingar til framleiðsluvirkir eru mettar til 32,0 mió.kr. mótvegis framroknað 45,2 mió.kr., svarandi til eitt fall uppá 13,2 mió.kr. ella 29,2%. Hetta er áðrenn umleggingar og sparingar eru innroknaðar í útreiðslubólkunum v.m., sum skulu gerast uppá íalt 10 mió.kr. fyri 2012.

Teir skaðar, sum ódnarveðrið í november og desember 2011 førdi við sær, kemur helst at ávirka útreiðslunar til tilfar og tænastuveitingar hjá felagnum nakað meiri enn væntað í 2011, og harvið eisini úrslitið fyri 2011. Hetta sjálvt um felagið er væl tryggjað.

At ætlaða nettolækkingin verður 13,2 mió.kr. stavar frá eini útsetan av viðlíkahaldi av verkum til 2013, har nevnast kann Heygaverkið við 4 mió.kr., verkið í Botni við 10 mió.kr. og verkið á Strond við 2,5 mió.kr.

Herumframt kann nevnast, at høvuðsumvælingar og uppgraderingar av turbinu 1 og 2 fara fram á verkinum á Eiði í løtuni. Kostnaðurin av hesum er mettur til 13,7 mió.kr. Henda umvæling og uppgradering verður býtt yvir tvey ár, soleiðis at ein partur av henni verður framd í 2012 og restin í 2013.

Av øðrum størri umvælingum í 2012 kann nevnast viðlíkahald av oljutangum á Sundsverkinum samlað mett til 4,8 mió.kr., og verkið á Strond við 2 mió.kr.

Í 2013 eru útreiðslurnar til tilfar og tænastuveitingar fyri framleiðsluvirksemið ætlaðar at verða 47,6 mió.kr. svarandi til eina hækking uppá 15,6 mió.kr. ella 48,8% í mun til 2012. Hækkingin stavar, sum nevnt omanfyri, frá útsettum viðlíkahaldsarbeiði.

### 6.2.2 Netvirksemið

Útreiðslur til tilfar og tænastuveitingar til netvirksemið eru mettar til 13,3 mió.kr. í 2012 mótvegis 21,0 mió.kr. framroknað fyri 2011, svarandi til eina minking uppá 7,7 mió.kr.ella 36,7%. Hetta er áðrenn umleggingar og sparingar eru innroknaðar í útreiðslubólkunum v.m., sum skulu gerast uppá íalt 10 mió.kr. fyri 2012.

Ódnarveðrið í november og desember 2011 hevur víst SEV á, at enn er neyðugt at gera ábøtur og broytingar á 60KV skipanina. Kostnaðurin av hesum skal kannast nærri og enn er ikki møguligt at taka hædd fyri hesum í ætlanini. Kostnaðurin av hesum kann tí ávirka rakstur og íløgur, út yvir tað sum er ætlað í fíggjarætlanini, komandi árini.

Í 2013 verða útreiðslurnar til tilfar- og tænastuveitingar fyri netvirksemið mettar at verða á sama støði sum fyri 2012. Roknað er tí við, at hesar eisini verða 13,3 mió.kr.í 2013.

### 6.2.3 Fyrisiting

Útreiðslur til tilfar og tænastuveitingar til fyrisiting eru mettar til 15,5 mió.kr. í 2012 mótvegis framroknað 11,3 mió.kr. fyri 2011, svarandi til eina hækking uppá 4,2 mió.kr. ella 37,2%. Hetta er áðrenn umleggingar og sparingar eru innroknaðar í útreiðslubólkunum v.m., sum skulu gerast uppá íalt 10 mió.kr. fyri 2012.

Ætlað verður við eini nettohækking uppá 4,1 mió.kr. í mun til lækkaða støðið í 2011, har ætlað spart verður 9,7 mió.kr. í mun til upprunaætlanina. Hækkingin uppá tær 4,1 mió.kr. stava í høvuðsheitum frá útreiðslum til benchmarkkanning av SEV, viðlíkahald av fyrisitingarbygninginum á Landavegnum, øktum kostnaði til tryggingar, spariátak í 2012 og annar kostnaður.

## 7. Avskrivingar

Avskrivingar eru mettar til 68,2 mió.kr. fyri 2012 við støði í verandi ognum, tilgongd og frágongd av ognum. Hetta er ein øking uppá 7,5 mió.kr. ella 12,4% í mun til framroknað fyri 2011. Orsøkin er vaksandi íløgur, sum felagið ger. Talið fyri 2013 er 85,8 mió.kr., svarandi til ein vøkstur uppá 17,6 mió.kr. ella 25,8%. Býtið av avskrivningunum millum árini kann variera nakað, alt eftir nær ognirnar verða tiknar í nýtslu.

Avskrivingarnar í ætlanini fyri 2012 og fram taka støði í teimum kravdu avskrivingaráramálunum ásettar av Elveitingareftirlitinum. Í ætlanini verða framleiðsluognir í miðal avskrivaðar yvir 35 ár undantikið ætlaða vindmyllulundin í Suðurstreymoy, sum verður avskrivað yvir 15 ár. Hetta verður mett at verða livitíðin hjá vindmyllum. Íløgur í netvirksemið verður avskrivað yvir 35 ár, eins og íløgur í rakstrargøgn verða avskrivaðar yvir 5 ár.

## 8. Íløgur

Roknað verður við íløgum fyri 180 mió.kr í 2012. Hesar býta seg soleiðis:

| Íløgur | 2012 | | Upprunaætlan 2011 | |
|---|---|---|---|---|
| | Mió.kr. | prosent | Mió.kr. | prosent |
| Eiðisverkið | 57,1 | 31,7 | 77,0 | 60,5 |
| Fossáverkið | 1,6 | 0,9 | 0,0 | 0,0 |
| Heygarverkið | 10,3 | 5,7 | 0,0 | 0,0 |
| Mýruverkið | 0,3 | 0,2 | 0,0 | 0,0 |
| Verkið í Botni | 0,1 | 0,1 | 0,0 | 0,0 |
| Vágsverkið | 0,8 | 0,4 | 0,0 | 0,0 |
| Verkið í Trongisvági | 3,3 | 1,8 | 0,0 | 0,0 |
| Sundsverkið | 24,0 | 13,3 | 4,0 | 3,1 |
| Smærri verk | 1,2 | 0,7 | 7,1 | 5,6 |
| Langtíðarætlan og vindmyllur í Neshaga 28 mió.kr. | 33,0 | 18,3 | 8,0 | 6,28 |
| Íløgur í framleiðsluvirkir íalt | 131,7 | 73,2 | 96,1 | 75,5 |
| Koblingsstøðir og net v.m. | 33,0 | 18,3 | 18,1 | 14,2 |
| Amboð, KT-útgerð, fjaravlestur og verkætlanin Grani v.m. | 15,3 | 8,5 | 13,1 | 10,3 |
| **Íalt** | **180,0** | **100,0** | **127,3** | **100,0** |

Íløgurnar fyri 2013 eru mettar til 403 mió.kr., harav vindmyllulund í Suðurstreymoy við 120 mió.kr. Fyri 2014 eru íløgurnar mettar 271 mió.kr. Tó skal fyrivarni takast fyri kostnaðarmetingar av teimum ymisku projektunum, sum skulu gjøgnumgangast nærri.

Eiðisverkið við tilhoyrandi tunlum verður væntandi liðugt medio 2013. Arbeiðið er mett at kosta í alt 250 mió.kr., sundurgreinað uppá tunlar og inntøk fyri 190 mió.kr. og turbina 3 á Eiði v.m. fyri 60 mió.kr. Tær 57,1 mió.kr. fyri 2012 kunnu sundurgreinast í 40 mió.kr. til tunlar og inntøk og 16,7 mió.kr. til turbinu 1 og 2 á Eiðisverkinum umframt 0,4 mió.kr. í aðrar smáíløgur.

Íløgur í Heygarverkið snúgva seg um íløgur í kontrollanlegg fyri 7 mió.kr. og ein bygning til maskin-transformara og háspenningsanlegg fyri 3 mió.kr. umframt aðrar smærri íløgur fyri 0,3 mió.kr. ella íalt 10,3 mió.kr.

Íløgur í sambandi við Sundsverkið eru serliga fyri at lúka umhvørvis- og trygdarkrøv frá myndug-leikum. Serliga er talan um at dagføra verandi tangagarð fyri 15,7 mió.kr. Herumframt verður ætlað við íløgu í nýggja bunkerleiðing fyri 2 mió.kr. og nýtt neyðdiesel anlegg fyri 4,0 mió.kr. umframt aðrar smærri íløgur av ymiskum slag fyri 2,3 mió.kr. ella íalt 24,0 mió.kr.

Íløgur ætlaðar í sambandi við skitsuuppskotinum fyri langtíðarætlanina viðvíkja vindmyllurnar í Neshaga fyri 28 mió.kr. Umframt hesar er 2,0 mió.kr. til øking og optimeringar, eins og 3 mió.kr. eru settar av til projektering av nýggjum verki á Sundi. Vindmyllurnar í Neshaga verða væntandi tiknar í nýtslu medio 2012. Vindmyllulundin í Suðurstreymoy er ikki tikin við í 2012 men í 2013 og verður ætlað at framleiða medio 2014.

Innan koblingsstøðir og net er tað serliga nýggj koblingsstøð í Vestmanna, sum skal byggjast. Hetta er ein íløga fyri í alt 28 mió.kr, býtt yvir tvey ár, 14 mió.kr. í 2012 og 14 mió.kr. í 2013. Íløgur í netið

annars er 19 mió.kr. Talan er um nýggjan transformara í Havnardali fyri 2 mió.kr, 60 kV kaðal frá Gøtudali til Klaksvíkar fyri 2 mió.kr í 2012, smærri transformarastøðir v.m. fyri 4 mió.kr., 10 og 20 kV kaðalar fyri íalt 9,0 mió.kr. umframt íkomin mál fyri 2 mió.kr., ella íalt 19 mió.kr.

Íløgurnar fyri 2013 eru ætlaðar til 403 mió.kr., harav vindmyllulund í Suðurstreymoy við 120 mió.kr.. Fyri 2014 eru íløgurnar ætlaðar til 271 mió.kr.

## 9. Rentur og avdráttir umframt lántøka

Rentuútreiðslur og avdráttir eru mett út frá galdandi lániavtalum og ætlaðum nýggjum lánum. Framroknað fyri 2011 er ein rentuútreiðsla uppá 13,8 mió.kr., meðan roknað er við eini nettorentu-útreiðslu uppá 22,3 mió.kr. í 2012, svarandi til eina øking av útreiðslunum uppá 8,5 mió.kr. ella 67%. Nettorentuútreiðslurnar fyri 2013 verða mettar til 33,5 mió.kr.

Í 2008 vóru rentuútreiðslurnar 3,5 mió.kr. mótvegis eini langfreistaðari skuld uppá 105,8 mió.kr. við árslok sama ár. Við árslok 2011 verður langfreistaða skuldin framroknað til 379 mió.kr. Tá er ein møgulig lántøka upp til 80 mió.kr innroknað. Hetta tal kann broytast, alt eftir lántøkuni. Skuldin við árslok 2012 verður ætlað til 456 mió.kr. svarandi til eina øking í skuldini frá 2010 til 2011 uppá 163 mió.kr og frá 2011 til 2012 eina øking uppá 78 mió.kr.

Henda stóra øking í rentuútreiðslum stavar frá øktari lántøku, sum felagið hevur verið noytt til at taka, grundað á gjørdar íløgur fyri 517 mió.kr. frá 2008 til 2012 og hall á rakstrinum í 2008, 2010 og 2011 fyri íalt 129 mió.kr. Avdráttirnir eru mettir at verða 20,6 mió.kr í 2012 og 23,7 mió.kr. í 2013.

Rentuinntøkurnar frá gjaldførinum eru mettar til at verða 2 mió.kr. í 2012 og 1 mió.kr í 2013.

Lánini, sum roknað er við fyri fíggingina av langtíðaríløgunum, hava eina afturgjaldstíð sum er inniverandi ár umframt trý tey næstu árini, sum eru avdráttarfrí. Hereftir verður lánið niðurgoldið yvir eitt 10 ára skeið. Verandi fígging hjá felagnum hevur ætlað eina afturgjaldstíð uppá 15 til 18 ár.

## 10. Gjaldførið

Í fíggjarætlanini fyri 2011 varð ætlað við eini lántøku uppá 130 mió.kr. Henda lántøka er fingin til vega. Umframt hesa lántøku verður mett skilagott at styrkja gjaldførið við upp til 80 mió.kr. meira í 2011 enn upprunaliga mett í 2010. Hetta kann gerast við at taka nýtt lán og ella seta á stovn ein kassakreditt í hesum sambandi. Endamálið er at hava eitt munagott gjaldføri soleiðis, at SEV altíð er ført fyri at rinda eitt oljukeyp kontant, í løtuni uppá umleið 30 til 40 mió.kr., umframt at verða ført fyri at rinda kostnaðin kontant fyri eitt óhapp á einum av framleiðsluverkunum ella netinum. Herumframt at hava eitt trygt gjaldføri til dagliga raksturin av felagnum. Tí verður gjaldføris-trygdarmargan ásett til at verða umleið 40 til 60 mió.kr. innistandandi í tøkum peningi. Trekningsrættirnir eru roknaðir til at taka.

Eisini verður mett skilagott at hava eitt munagott gjaldføri í hesum tíðum við atliti at ótryggleikanum á fíggjarmarknaðunum kring heimin.

**Lántøka og kassakreditt (kk) í 2011 íalt upp til 210 mió.kr.**

Lántøka og kk. higartil í 2011 — Lán við 100 mió.kr. og kassakredittur uppá 30 mió.kr., samtykt á eykaaðalfundinum í 2010 í sambandi við rakstrarætlan fyri 2011.

Meirlántøka og kk. í 2011 — Upp til 80 mió.kr., Samtykt á eykaaðalfundinum tann 19. desember 2011. Felagið vil í sambandi við lántøkuna meta um tørvin av gjaldføri í mun til ásettu trygdarmargu, og vil í hesum sambandi ikki taka meiri lán og ella kassakreditt, enn tørvur er á í mun til ætlaðar íløgur til rakstur og til ásetta minsta mark fyri gjaldføri.

**Lántøka íalt í 2012:** 99 mió.kr. Samtykt á eykaaðalfundinum tann 19. desember 2011.

Væntaða lántøka komandi árini framyvir verður á einum høgum støði. Henda fer at hanga saman við teimum íløgum, sum liggja fyri framman hjá felagnum. Nevnast kann, at ætlað er við eini lántøku í 2013 uppá 340 mió.kr. og 170 mió.kr. í 2014. Gjaldførið við endan av september 2011 var 83,1 mió.kr. umframt trekningsrættir hjá lánveitarum uppá 33 mió.kr. ella íalt 116,1 mió.kr. Tann 15. desember 2011 var gjaldføri felagsins 23 mió.kr til íløgur og rakstur. Herumframt trekningsrættir uppá 33 mió.kr.

Neyðugt er hjá felagnum at hava sera gott gjaldføri kring ársskiftið, tí felagið móttekur ikki stórvegis pening frá kundunum í desember og januar mánað hvørt ár, tí hesir mánaðir eru sum heild gjaldsfríir. Ikki fyrr enn miðjan februar fær felagið inngjaldingar aftur. Hinvegin skal felagið rinda fyri íverksettar íløgur og rakstur í sama tíðarskeiði. Serliga er talan um stórar upphæddir til keyp av olju. Niðanfyri standandi talva vísir í høvuðsheitum gjaldførið úr sundurgreinaða gjaldførisyvirlitinum hjá felagnum. Tølini eru í t.kr.

| | Upprunaætlan fyri 2011 | Staðfest og ætlað fyri 2011 | Ætlan fyri 2012 |
|---|---:|---:|---:|
| Gjaldføriískoyti frá rakstrinum | 27.068 | 20.652 | 51.972 |
| Broyting, skuldarar, ognarar og goymslur | -500 | -56.874 | **)0 |
| | **26.568** | **-36.222** | **51.972** |
| Íløgur | -127.339 | -112.099 | -179.950 |
| Lántøkur | 130.000 | 210.000 | 99.000 |
| | **29.229** | **61.679** | **-28.978** |
| Goldnir avdráttir | 19.598 | 18.098 | 20.693 |
| | **9.631** | **43.581** | **-49.671** |
| Ágóði við ársbyrjan | 24.000 | 42.143 | 85.725 |
| **Gjaldføri við ársenda** | **33.631** | **85.725** | **36.053** |

**) Ikki ætlað við broytingum

Tær 36 mió.kr í gjaldføri eru áðrenn umleggingar og sparingar eru innroknaðar í útreiðslubólkunum v.m., sum skulu gerast uppá íalt 10 mió.kr. fyri 2012. Hesar umleggingar og sparingar koma at hava eina ávirkan inn á gjaldføri felagsins positiva vegin.

Sum omanfyri standandi talva vísir, verður roknað við eini meirlántøku uppá 80 mió.kr. í 2011 enn upprunaliga mett. Eftir hetta gerst gjaldførið 85,7 mió.kr. við endan av desember 2011 umframt trekningsrættir í peningastovnum uppá 33 mió.kr. Í gjaldførisyvirlitinum er roknað við eini lántøku uppá 80 mió.kr við endan av 2011.

Lagt verður upp til, at felagið kann taka upp til 80 mió.kr. í nýggjari lántøku í 2011, men at felagið ger av í mun til tørvin, hvussu nógv takast skal, og hvussu hetta skal skipast. Við lántøku uppá 80 mió.kr. í desember 2011 ella í januar 2012 er gjaldførið gott alt árið 2012 saman við aðari nýggjari lántøku uppá 99 mió.kr. í 2012. Gjaldførið við endan av desember 2012 er ætlað til 36,1 mió.kr. Hetta ávirkast positiva vegin við umleggingini og sparingunum uppá 10 mió.kr., sum felagið skal gera í 2012.

Ein av avbjóðandi uppgávunum í 2012 verður at eftirhyggja samlaðu fíggingina hjá felagnum fyri at tryggja, at hon er so optimal, sum til ber.

Í 2013 verður ætlað at taka 340 mió.kr. í lán og gjaldførið við endan av desember 2013 er ætlað til 36,6 mió.kr. umframt trekningsrættir uppá 30 mió.kr. hjá lánveitarum.

Tórshavn, 19. desember 2011

Elfelagið SEV

---

Eftirfylgjandi talvur vísar ávirkanina av eini príshækkan uppá 0,10 kr. pr. kWt **áðrenn** umleggingar og sparingar uppá 10 mió.kr. verða innroknaðar.

Orsøkin til, at ætlanin tekur støðið í úrslitinum áðrenn umleggingar og sparingar er, at leiðsla felagsins í løtuni er í fer við at gjøgnumganga øll virkisøkir fyri at umleggja og tillaga raksturin soleiðis, at umleggingin og sparingin uppá 10 mió.kr. verður gjøgnumførd á ein so skinsaman hátt sum til ber.